## Tryggingar skerja tænastu

**Vanlig tænasta verður ikki longur veitt í teimum økjum, har sjúkan SARS ger seg galdandi. Tað ávarar stjórin hjá TRYGD Christian Nielsen um.**

SARS
*Ingi Rasmussen*

Útlendsku alarmsentralarnir hjá tryggingarfeløgunum kunnu fáa trupulleikar at veita tær tænastur til tey ferðandi í útlandinum, sum verða smittaðir við SARS.

Tað sigur Christian Nielsen, stjóri í TRYGD. Hann hevur sent eitt tíðindaskriv út til føroysku fjølmiðlarnir, sum kemur frá Forsikringens Hus. í Danmark

– Okkara støða er júst tann sama sum í Danmark, tí vit brúka somu alarmsentralarnir, sigur Christian Nielsen.

Hann vil onki siga um, hvussu álvarsliga tryggingarfeløgini meta nýggju sjúkuna SARS, sum ger um seg í Kina og Hong Kong og hevur breitt seg til eini 20 lond. Men hann vil bara vísa á, at undantaksstøðan ger, at tú ikki kanst rokna við at fáa ta vanligu tænastuna frá tryggingarfeløgunum, um tú verður smittaður við SARS.

– Um tú ferðast til eitt land, har SARS ger um seg, so skalt tú vera greiður um, at tað ikki er vist, at tú kanst fáa hjálp, soleiðis sum tú hevði væntað. Tað vil eitt nú siga, at tað ikki er vist, at tú kanst verða sendur heim, um tú verður smittaður við SARS, tí útferðarforboð er galdandi. Tú kanst heldur ikki væntað at vera fluttur til tað besta sjúkrahúsið, sum vit plaga at gera, men mást finna teg í at vera innlagdur á almenn sjúkrahús, sigur Christan Nielsen.

Stjórin í TRYGD leggur staðiliga dent á, at teir onki kenna til nakað dømi um føroying, sum hevur fingið sjúkuna SARS.

# Ávara og kunna um SARS



*Enn eru føroyingar ikki smittaðir við sjúkuni SARS, sum serliga hevur rakt kinverjar. Men á flogvøllinum og aðrastaðni verður kunning nú sett upp, har ávarað verður ímóti sjúkuni.*

*Mynd: Reuters*

**Á flogvøllinum í Vágum er ein stór plakat sett upp, sum kunnar ferðafólk um sjúkuna SARS og faldarar við kunning vera bodnir ferðafólkum. Landslæknin ávarar ímóti at ferðast til ávís lond, men enn er tað bara ótryggleikin um SARS, ið hevur breitt seg til Føroya, tí onginin hevur fingið sjúkuna. Spurningurin er, hvussu nógv er at óttast.**

SARS
*Ingi Rasmussen*

Skelkurin breiðir seg í stórum parti av heiminum, so hvørt fleiri verða smittað við sjúkuni SARS. Seinastu tølini siga, at 2671 fólk eru smittað við influensa-líku sjúkuni. Millum trý og fýra av hvørjum hundrað smittaðum doyggja.

Landslæknin í Føroyum ávarar nú føroyingar ímóti at fara óneyðugar ferðir til økini, serliga Hong Kong og Kina, har sjúkan leikar á. Eins og heilsustovnurin WHO ger. Og í gjár vóru plakatir hongdar upp við flogvøllin í Føroyum, har kunnað var um, hvussu fólk, ið fara til ella koma frá smitturaktu økjunum, skulu bera seg at.

Men hvussu álvarslig er sjúkan, spurdu vit Høgna Debes Joensen, landslækna. Er tað til dømis rímiligt at samanbera sjúkuna við sponsku sjúku, sum drap millum 40 og 50 milliónir fólk í árunum 1918-1919?

– Tað er ilt at siga. Enn er so stutt fráliðið, at vit ikki rættiliga kunnu siga, hvussu álvarslig sjúkan er. Tað er sjálvandi álvarsligt, tá 3,5 prosent av teimum smittaðu doyggja, og tí er tað rímiligt at gera tiltøk, sum skulu forða sjúkuni í at breiða seg. Men tað er heldur ikki rætt at yvirreagera. Og tí er heldur ikki neyðugt at kanna ella avbyrgja øll, sum hava verið í økjunum, sigur Høgni Debes Joensen.

### Ongin føroyingur

Landslæknin hevur sent tilfar út til allar kommunulæknar, sjúkrahús og nú eisini flogvøllin, har sagt verður, hvussu sjúkan vísir seg, og hvussu hon skal fráboðast.

Enn hevur ongin føroyingur fingið staðfest smittuna, men vit vita, at føroyingar ferðast víða, og til dømis nógvir sjómenn ferðast til Hong Kong, har sjúkan ger einamest um seg. Vit vita eisini um fólk, sum hava búð í Hong Kong og nú skunda sær heimaftur, tí tey eru bangin. Tey vera ikki kannað uttan víðari, sigur landslæknin.

– Tað er ikki neyðugt við avmarkingum fyri fólk, sum eru frísk og koma úr hesum økjum. Men vit gera vart við, at um tey innan 10 dagar fáa fepur og fáa trupulleikar við andaleiðini, so skulu tey beinanvegin seta seg í samband við lækna. So um tú spyrt, um øll vera kannað við heimkomu, so er svarið nei, sigur Høgni Debes Joensen.

Tað er støðan í dag, ger hann vart við. Í morgin er støðan kanska ein onnur, tí alt broytist so skjótt. Sum nú er verður serliga ávarað ímóti at ferðast til Kina, Hongkong, Taiwan, Hanoi, Vietnam og Singapore.

### Gátan um SARS

Meðan heimurin ger alt fyri at avbyrgja sjúkuna, royna serfrøðingar av øllum alvi at loysa gátuna um SARS, sum stendur fyri Severe Acute Respiratory Syndrome.

Fyribils benda kanningar á, at smittan ikki breiðir seg gjøgnum luftina. Líkt er til, at tú skalt nerta við ein smittaðan ella vera tætt saman við viðkomandi fyri at vera smittaður. Tí eru tað mest starvsfólk á sjúkrahúsum og avvarðandi, sum verða smittað.

Sostatt smittar sjúkan ikki sum barnasjúkurrnar meslingar og fárasjúka, sum kunnu ferðast fleiri metrar gjøgnum luftina. Hinvegin kann virussið yvirlivað í fimm tímar. Og tí kanst tú eisini verða smittaður, um tú nertir við eitt stað, har ein sjúklingur t.d. hevur njóst.

Sjúkan varð fyrstu ferð staðfest í november í landspartinum Guandong í Kina. Nógv halda, at sjúkan stavar frá djórum.

**Fakta**

**SARS**

Severe Acute Respiratory Syndrome (SARS) er ein sjúka, ið líkist influensa. Í fyrstu syftu er hon ring at kenna frá øðrum vanligum sjúkum í andaleiðini.

Sjúkan byrjar við fepuri yvir 38 stig, ofta saman við kuldaskjálvta og stívleika í musklunum. Kanska hevur tú eisini høvuðpínu, ert illa til passar og hevur pínu í musklum. Eftir trimum til sjey døgum fáa sjúklingarnir turran hosta, andaneyð ella trupulleikar at draga andan. 10 til 20% av sjúklingunum hava so stórar trupulleikar, at teir fáa brúk fyri respiratori.

Bara nøkur fá, millum 3 og 4%, doyggja av sjúkuni.

*Kelda: Statens Serum Institut, www.ssi.dk*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Absalon í Snarskivuni



Hósdagin lat Absalon Hansen upp framsýning við fotomyndum í Snarskivuni í Havn. Hetta er fyrsta framsýning av sínum slag við 13 stórum fotomyndum. Myndirnar eru longri enn vanligar myndir. AWJ í Runavík hava vaksið um myndirnar og Atlanticpane í Kollafirði hava rammað tær inn. Absalon, ið er útbúgvin bankmaður, arbeiðir mest sum myndamaður, umframt tað at hann er røktingarmaður í Hósvík. Hann ger myndir fyri ferðavinnuna og gevur sjálvur út ein myndakalendara. Eisini hevur hann givið út bókina Føroyar, við føroyskum myndum, sum Jens Pauli Heinesen rithøvundur setti myndatekst til. Fyri trimum árum síðan hevði Absalon eina framsýning í Tallin í Eystlandi fyri Nordisk Ministrerråd. Framsýningin í Snarskivuni er opin gerandisdagar frá kl. 9-16, hósdag er opið frá 9-18.

## Johs Bech-Jensen í Smiðjuni



*Johs Bech-Jensen og konan, Elvi, í Smiðjuni í Lítluvík.*

Týsdagin 8. apríl lat Johs Bech-Jensen upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Johs er 57 ára gamal og føddur og uppvaksin á Stevns á Sælandi. Hann hevur málað í 15 ár og er sjalvlærdur. Í dag býr hann í Keypmannahavn. Hann hevur búð í Klaksvík og á Eiði fyri umleið 30 árum síðan. Flestu málningarnir á framsýningini eru akryl á lørift. Eisini er málað á rekavið og á akryl á plátum. Tey flestu motivini eru føroysk. Í dag, fríggjadagin 11. apríl frá kl. 17-19, er móttøka, har okkurt leskiligt verður at fáa.

Framsýningin er opin frá 8. til 22. apríl, gerandisdagar er opið frá kl. 11-17.

Fríggjadagin 11. apríl er opið frá kl. 11-19.

Leygardagin 12. apríl er opið frá 10-13.

Skírisdag og Langa fríggjadag er opið frá kl. 14-19.

Leygardagin 19. apríl er opið frá 10-20.

Páskadag er opið frá kl. 14-17.

Mánadag 21. apríl frá kl. 16-20.

## Kári Olsen til Bileftirlitið



1. apríl varð Kári Olsen í Havn settur sum eftirlitsmaður hjá Bileftirlit Føroya. Kári, ið er 38 ára gamal, er føddur og uppvaksin í Vestmanna. Hann lærdi til bilmekanikara á bilverkstaðnum hjá Óla Hans Jacobsen í Vestmanna frá 1981-85 og arbeiddi har í nøkur ár. Í 1988 fekk hann starv á bilverkstaðnum hjá Strandferðsluni á Hjalla. Hann hevur arbeitt á bilverkstaðnum hjá Brøður Petersen og seinni hjá VR Bilum við Hoyvíksvegin. Uppgávan hjá honum á Bileftirlitinum er at hava regluliga eftirlit og umsýn av akførum.

## Dagurin

11. apríl. Leo, deyður í 461. Pávi Leo 1., nevndur tann Mikli. Talaði Artala húnakong frá at hertaka og ræna Róm. Navnið Leo merkir leyva.

## Nøvn í vikuni

### Kennir tú onkran ...

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:.................................................................................................
Bústaður:...........................................................................................
Bygd/býur:.....................................................Tel:..................................
Evt. arbeiðspláss:...............................................................................

Merkisdagurin er: ..............................................................................

Innsendari: ......................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
**Sosialurin** • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo